# Sølufólk við vinnuinnliti søkist

## TRYGD leitar eftir sølufólki til vinnudeildina

**STARVIÐ**
Talan er um eitt sera frítt, sjálvstøðugt, spennandi og avbjóðandi starv, har høvuðsábyrgd tín verður at selja tryggingar til vinnukundar og ráðgeva teimum. Samstundis fært tú ábyrgdina av einum kundabólki, sum skal hava virkna kundarøkt.

Stórur dentur verður lagdur á at koyra út til bæði verandi og nýggjar kundar við sølu og kunning í hyggju. Í sambandi við sølu kann roknast við nakað av umsitingarligum uppgávum. Upplæring syrgir TRYGD fyri, og saman við starvinum fylgja møguleikar fyri útbúgving á tryggingarakademinum umframt onnur útbúgving eftir tørvi.

**TÚ**
Tú ræðist ikki avbjóðingar og dugir væl at selja. Tú trívist væl við at arbeiða sjálvstøðugt, ert jasøgin, dugir væl at samstarva og tekur ábyrgd. Tú arbeiðir eisini skjótt og hevur sjálvandi handilsligan sans. Kunnleiki til føroyskt vinnulív er ein fyrimunur.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggingarstovnar og Finansforbundet.

Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við avritum av viðkomandi skjølum um útbúgving og arbeiðsroyndir skal vera okkum í hendi innan 21. apríl 2009.

Send umsóknina til: P/F TRYGD, att: Jean Djurhuus
Gongin 7, boks 44, 110 Tórshavn ella til jdj@trygd.fo.
Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Ellu Mortensen, leiðara á vinnudeildini, á tel. 55 81 11 ella á elm@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 21 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 90 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREISTIN ER 21. APRÍL 2009**

**TRYGD**
leitar eftir tær.

HVAT MERKIR UV ?

VER VIÐ Í STÓRARI SPENNANDI KAPPING Á WWW.TORSHAVN.FO

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

IKON // TEL 320 870

Flagtekju?
Norskar flagtekjur
Skjótt og ómakaleyst
Eisini hava vit nævur og torvhaldsjørn.
Ring og fá eitt óbindandi tilboð.

SJÓVINNUBÚÐIN

v/ Jákup á Lag · P.O. Boks 230 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 584020 · sjovinnubudin@kallnet.fo

Hondbóltsamband Føroya
The Faroese Handball Federation

**Frá Hondbóltssamband Føroya**
Aðalfundur verður leygardagin 9. mai
kl. 10.00 í ÍSF húsinum.
Skrá sambært lógum felagsins.
**HSF**



Altíð tað nýggjasta
www.sosialurin.fo